LÍVDIN

# alpha

## Skeið í Lívdini



# Um Alpha-skeiðið

## Hvar:

Livdin, Vegurin Langi 11, Hoyvík

## Kostnaður:

895 kr, sum fevnir um undirvísingartilfar, mat og eina gisting, sum verður á Brúnni í Skálavík.

Skal rindast á kontu 6460-6137182 og viðmerkjast: ”Alpha”. Skeiðsgjaldið kann rindast í einum ella við 300 kr. um mánaðin í januar, februar og mars.

## Tilmelding:

Tilmeldaing fer fram á [https://www.livdin.fo/alpha/](https://www.livdin.fo/alpha/)

## Meira fæst at vita á:

Tlf. 228004 / alphaskeid@gmail.com

# Hvat er Alpha?

Alpha er eitt skeið, har tú saman við øðrum kanst kanna kristnu trúnna nærri. Kanska tú finnur svarið, um tú ert opin og forvitin.

Alpha-kvøldini byrja við, at vit eta eina máltíð saman, síðani verður ein fyrilestur um evnir sum t.d. ”Hvør er Jesus?”, ”Hví og hvussu skal eg biðja?” og ”Hvussu fái eg mest burturúr restina av lívinum?” og onnur áhugaverd evnir.

Eftir at vit hava fingið ein drekkamunn, fara vit í smærri bólkar, har vit kunnu práta saman um tað, sum evnið hevur givið íblástur til. Í bólkinum kunnu øll koma til orðanna, og har er rúm fyri trúgv, iva og tolsemi.

Alpha er fyri øll, uttan mun til hvørja sannføring tú hevur um trúgv.

Alpha-skeiðið er ein samanhangandi skeiðsrøð yvir 11 mikukvøld, eitt fríggjakvøld, ein heilan leygardag og Alpha-veitslu.

Tú fært mest burturúr við at luttaka øll skeiðskvøldini. Um tað ikki ber til at koma onkur kvøld, ert tú kortini vælkomin at luttaka tey kvøldini, tað liggur fyri.

Um tær dámar samfelag, áhugaverd prát og hugnaligar máltíðir, so er Alpha-skeið tað rætta fyri teg.

## Skrá fyri mikukvøldini

| | |
|---|---|
| Kl. 19:00-19.30 | Vælkomin og máltíð |
| Kl. 19.30-20.00 | Undirvísing |
| Kl. 20:00-20-15 | Drekkamunnur |
| Kl. 20:15-21:00 | Práta um evnið í bólkum |

## Tíðarætlan

| Dagf. | Evni |
|---|---|
| 14-01-26 | Kristindómurin: Keðiligur, ósannur og óviðkomandi? |
| 21-01-26 | Hvør er Jesus? |
| 28-01-26 | Hví doyði Jesus? |
| 04-02-26 | Hvussu kann eg verða viss í míni trúgv? |
| 11-02-26 | Hví og hvussu skal eg lesa Bíbliuna? |
| 18-02-26 | Hví og hvussu skal eg biðja? |
| 25-02-26 | Grøðir Gud í dag? |
| 27-02-26<br>28-02-26 | Hvør er Heilagi Andin?<br>Hvat ger Heilagi Andin?<br>Hvussu kann eg verða fylt av Andanum?<br>Hvussu leiðir Gud okkum? |
| 04-03-26 | Hvussu standi eg ímóti tí ónda? |
| 11-03-26 | Hví og hvussu skulu vit fortelja øðrum tað? |
| 18-03-26 | Hvat við kirkjuni/samkomuni? |
| 21-03-26 | Alphaveitsla |
| 25-03-26 | Hvussu fái eg mest burturúr restina av lívinum? |